Oyggjablaðið
Mikudagur 16. juni 2010 · Nr. 95

# EIN BÁTUR KANI

**RUNAVÍK – Eg havi framvegis góðan hug at smíða kappróðrarbátar. Men so má eg samstundis viðganga, at hetta er eitt sera einsligt arbeiði, sigur bátasmiðurin, Sámal Hansen. Síðani hann smíðaði fyrsta bátin í 1996, hevur hann latið langt omanfyri 60 aðrar úr hondum.**

Snorri Brend

Tað var tann tíð, tá føroyski báturin hevði sín týdning, tá farið varð á handilsferð ella til útróðrar.

Tá hesin týdningur so líðandi minkaði við menningini á sjógvi og landi, var farið undir at skipa fyri kappróðri á ólavsøku og í sambandi við aðrar stevnur.

Fyrstu árini var mest róð við teimum bátum sum vóru tøkir, men seinnu árini hava feløgini latið smíðað bátar til kappróður.

Í síni tíð var tann víða kendi og væl dámdi Niklas í Koltri hann, ið smíðaði flestu bátarnar. Í dag er Sámal Hansen úr Runavík hann, ið smíðar allarflestu kappróðrarbátarnar. Og einki bendir á, at hann fer at gerast arbeiðsleysur við tað fyrsta.

– Nei, tað rokni eg ikki við. Eg eri beint nú í ferð við at gera ein bát lidnan. Og so standa ein rúgva av øðrum bátum og bíða, sigur Sámal Hansen, sum beinanvegin ætlar sær undir tann næsta.

Hóast hann í mangar mátar hevur eitt einsligt arbeiði, er hann eisini við í øðrum verki. Hann er formaður í tí lokala róðrarfelagnum, og er stýrimaður í bátinum sum dóttir hansara rør við. Og so er hann mín sann eisini venjari hjá smádreingjunum í NSÍ.

– Tú sært, – eg havi nokk at gera, og havi næstan ikki tíð at smíða bátarnar, sigur hann við einum brosi.

## 11 sterkir mans

Inni í kjallara sínum er Sámal í løtuni í ferð við at smíða ein nýggjan kappróðrarbát.

Talan er um eitt nýtt 10-mannafar til Havnar Róðrarfelag – við øðrum orðum: ein nýggjan Havnarbát, sum verður klárur í hesi vikuni.

Ætlanin var vist, at hann skuldi vera klárur til ársins fyrsta FM-róður í Klaksvík næstseinasta vikuskiftið. Og fyri Sámal hevði tað neyvan verið nakar trupulleiki at halda tíðarfreistina.

Men í farnu viku upplivdi Sámal tað heldur sjáldsama og løgna, at hann ikki fekk fatur á øllum tilfarinum til liðuggerð av bátinum, m.a. tí serliga seyminum.

– Hinvegin vísti tað seg, at tað var nokk eingin manning til bátin beint nú. Og tí havi eg tikið árarnar og annað fram um tað, greiðir Sámal frá. – Annars hevði hann langt síðani verið liðugur.

Tí er lítið hugsandi at nýggi Havnarbáturin fer at rógva sín fyrsta róður á Eystanstevnu. Fyrst er altso neyðugt, at 11 sterkir mans bjóða seg fram at manna bátin.

Hetta átti at verið ein gularót hjá sterkum monnum. Tað er ikki gerandiskostur at ein sleppur at taka ein nýggjan kappróðrarbát í nýtslu.

## 15 bíðaðu

Ein av døgunum í hesi vikuni var annars ætlanin, at Havnarbáturin skuldi latast nýggju eigarunum. Men lítið sannlíkt er, at Sámal verður arbeiðsleysur við tað fyrsta.

Sum ein av ídnu bátasmiðum okkara hevur hann smíðað eitt stórt tal av verandi kappróðrarbátum okkara – einar 60 í tali. Og fleiri aðrir standa longu nú á bíðilista.

– Ja, eg havi nakrar bíleggingar liggjandi, kanska ikki so nógvar

**›› Eg havi onga frágreiðing um, hví tað er so, at tað er vorðið »smart« hjá kvinnum at rógva kapp her í Runavík**



**HAVNABÁTURIN**

*Róðrarfelagið í Havn hevur bílagt nýtt 10-mannafar. - Tað er liðugt nú, men eg havi skilt at teir hava havt trupult við at manna Havnarbátin, sigur Sámal Hansen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Smart at rógva hart

*– Tað tykist, sum kvinnurnar ikki smæðast við at seta seg við árarnar, meðan ov fáir menn hava áhuga fyri kappróðri beint nú í øllum førum, sigur Sámal Hansen, sum eisini er formaður í lokala kappróðrarfelagnum. Tað hevur ikki gingið eins væl og undanfarin ár at manna bátarnar hjá monnunum í ár, meðan tað hevur gingið munandi lættari hjá kvinnunum. Hesa somu gongdina ella munin sær ein aftur innan aðrar ítróttargreinir í økinum: Kvinnurnar hava havt trupult við at manna liðini í fótbólti, men eru hinvegin rættiliga frammarlaga í fimleikafelagnum STØKK og hondbólti við Tjaldrinum. Í ár er soleiðis bert manning fingin til Eysturoying, meðan kvinnurnar og genturnar taka sær av restini. Og restin er ikki so heilt lítil kortini: Her hevur felagið soleiðis gentur í Spógvanum og Tjaldrinum í barnaróðrinum, eins og 5-mannafarið Tjaldrið er mannað og 6-mannafarið Sølmundur. - Eg havi onga frágreiðing um, hví tað er so, at tað er vorðið »smart« hjá kvinnum at rógva kapp her í Runavík, sigur Sámal Hansen.*